# Nýggjur leiklutur

**Millum mongu føroysku áskoðararnar á skotlandsferðini er eisini fyrrverandi landsliðsskiparin, Jens Kristian Hansen**

LANDSDYSTUR
*Jákup Mørk/*
*Álvur Haraldsen*



**Glasgow:** Hjá Jens Kristiani Hansen skuldi ferðin til Skotlands eftir ætlan verið tann seinasta sum landsliðsleikari. Skaðar gjørdu tó, at hetta varð av ongum, og ístaðin tykist fyrrverandi liðskiparin at vera farin undri nýggja tilveru sum 12. maður Ein tilvera, sum tó kanska ikki er so nýggj kortini.

Á stóru gongugøtuni í Glasgow, gingu vit orðið á Jens Kristian, og hann tóktist í øllum førum ikki at hava mist mótið, fyri tað um hann ikki longur er partur av liðnum.'

– Tað var so ongan tíð meiningin, at hendan ferðin skuldi vera hin allar seinasta við landsliðnum. Kanska sum leikari, men avgjørt ikki sum áskoðari.

– Eg havi jú roynt tann lutin onkra tíð fyrr, og tað hava altíð verið góðir túrar. Men tað hevur tó ikki verið so, at eg havi gingið og hugsað um, at tá eg gevist sum leikari, so haldi eg fram sum áskoðari.

Og er tað so langt síðani, at tú gjørdi av, at nú skuldi tú við hendan túrin.

– Nei. Faktist var tað daman, sum av fyrstan tíð bjóðaði mær. Hon ætlaði, at tað skuldi verða føðingardagsgávan (Jens Kristiain fylti 32 ár mikudagin blðm.), til mín. Men seinni varð hetta tó broytt nakað, soleiðis at vit gjørdu hetta til eitt slag av virkisútferð, soleiðis at vit eru tríggir á starvsplássinum, sum eru farnir við.

## Øðrvísi uppliving

Tá dysturin verður leygardagin, er einki at ivast í, at kenslurnar hjá Jens Kristiani fara at vera eitt sindur øðrvísi, enn tær hava verið á so nógvum øðrum landsliðsferðum.

– Tað er so heilt víst. Tá mann er vanur at vera niðri á vøllinum, so er tað jú ein heilt onnur uppliving, sum er av áskoðaraplássunum, men hinvegin, so er hetta ikki heilt nýtt. Eg var í Parkini á sinni, og tá landsliðið spældi í Slovakia, varð eg skaddur beint undan fráferðini, so tað ferðina fór eg eisini sum áskoðari. Og so fekk eg eisin ein hálvleik á áskoðaraplássunum í Sveis, men tað var so orsakað av einum reyðum korti.

– Tað eru sjálvandi nógvir lutir, sum eru øðrvísi í mun til tað at spæla, men í øllum førum er hetta eitt sindur meria róligt. Hóast áskoðararnir sjálvandi eisini eru spentir, so eru vit ikki undir sama trýsti, sum teir á vøllinum, so eg rokni við, at eg verið eitt sindur róligari hesaferð, enn tá mann er á vøllinum.

Sum nevnt omanfyri, so var tað ætlanin hjá Jens Kristiani, at hetta landsliðsárið skuldi verða tað seinasta fyri hansara viðkomandi. Men hóast hetta so varð av ongum, tykist hann á ongan hátt vónbrotin um, at tað gjørdist so.

– Tað skuldi bara ikki verða so. Eg hevði sjálvandi vonir um, at fáa onkran dyst afturat, og sum so var tað høvuðsorsøkin til, at eg tók eitt ár afturat. Men eftir skaðan, sum eg fekk í vár, men tað havi eg so ikki fingið. Kanska eri eg bara blivin og gamal til hetta, og Súni hevur gjørt tað gott á vinstra bakki, síðani hann kom inn, so tað má eg bara góðtaka. Eg havi tað eisini fínt í hesum leiklutinum, so tað er ikki nakað, sum plágar meg á nakran hátt.

## Fótbóltsfamilja

Neyvan verður tað so, at Jens Kristian fer at ferðast til allar útidystirnar hjá landsliðnum framyvir. Men nakrar ferðir fer tað nokk at blíva til, og tað tykist ikki vera vandi fyri, at hann skal vera alt ov einsamallur á hesm.

Stóribeiggin, Tummas Eli Hansen, var jú í nógv ár millum álitini á landsliðnum, og Jens Kristian roknar við, at tað fer at bera til, at lokka hann við á onkrari ferð.

– Vit kundu jú hóskandi gjørt tað til eina familjuútferð. Pápi okkara hevur jú eisini verið drúgvur at fylgja landsliðnum, og fyri tað um vit báðir ikki longur teljast millum leikararnar, so rokni eg framvegis við, at hann eisini hevur hug at fara. Hesa ferð lág tað so ikki fyri hjá honum, men hann man fara at koma við aftur. Tað ivist eg onga løtu í.

## Ókendir skotar

Áðrenn vit enda prátið við fyrrverandi liðskiparan, spyrja vit hann sjálvandi eisini, um tað eru nøkur góð ráð, sum hann kann veita leikarunum, áðrenn teir leygardagin fara inn á Hampden Park.

– Teir skulu í øllum førum ikki hava alt ov stóra virðing fyri skotunum. Liðið hjá teimum í dag er í øllum førum ikki eins sterkt, sum tað onkra tíð hevur verið. Leikaralistin telir bara eina tríggjar-fýra kendar leikarar, og so er restin leikarar, sum spæla í lægru ensku deildunum, ella á onkrum av smærru liðunum í Skotlandi.Og so eru teir heldur ikki so væl samansjóvaðir, tí útskiftingin á liðnum hevur verið so stór. Tað kann geva ein fyrimun, um alt ikki teimum eftir vild.

So tað verður kanska til eitt stig ella trý?

– Hevði tað verið so væl. Møguleikin er jú altíð til staðar, og Henrik lovaði jú eisini sjey stig. Skal tað halda, so krevst jú ein sigur her leygardagin, men nú fáa vit so at síggja, segði Jens Kristian at enda. Leikarin, sum nú hevur fingið 12-talið á ryggin.

# Lambert ivasamur

Leikarin, sum flestu skotsku miðlarnir geva ans undan leygardegnum er liðskiparin á landsliðnum, Paul Lamberg. Hann hevur drigist við ein skaða seinastu tíðina, og meðan liðfelagarnir nú venja, hevur hann bara hildið til í svimjihylinum, so føturin ikki verður overvaður av venjing.

Og hóskvøldið var í øllum førum framvegis ivasamt, hvørt liðskiparin fór at verða tøkur leygardagin.

– Enn er so einki avgjørt. Vit arbeiða við tí hvønn dag, men tað verður so ikki fyrr enn beint fyri dystin, at endaliga avgerðin verður tikin, segði Paul Lambert við sjónvarpsrásina, Sky News, hóskvøldið.

*-jm*





*Føroysku áskoðararnir fóru alt fyri eitt undir virksemið. Her eru tað Regin Egholm og Jónleif Fredriksen, sum royna at seta lit á*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Glasgow fær føroyskar litir

**Sum vant ætla føroysku áskoðararnir at gera nógv burturúr**

LANDSDYSTUR
*Jákup Mørk*

Ein sjálvsagdur partur av landsliðsferðini er uttan iva føroyski 12. maðurin. Er tað nakar, sum er serliga ímyndin av hesum, so er tað uttan iva Regin Egholm, sum hevur verið formaður hjá føroysku áskoðarunum, síðani felagið varð stovnað.

Og skal metast eftir luttakaratalinum, so er hetta ein av teimum stóru uppgávunum hjá Regini og teimum. Bara við 12. manni eru gott og væl 200 áskoðarar teknaðir, og tá so restin av ferðalagnum verður talt við, verður talan um eina hálva føroyska útisetalegu í Skotlandi.

Longu klokkan fimm mikudagin var sølubásurin riggaður til á Flogvøllinum, og einki er at ivast í, at umsetningurin í hesum verður hampuliga stórur á ferðini, soleiðis at føroysku litirnir kunnu seta sín dám á Glasgowøkið komandi dagarnar.

# Skotskur niðurtúrur

**Skotar hava ofta borið orð fyri at vera sear ernir av sínum landsliði, men soleiðis tykist støðan ikki vera í løtuni. Als ikki**

LANDSDYSTUR
*Jákup Mørk/*
*Álvur Haraldsen*

**Glasgow:** Fótbóltsskotland er í døpuduga í hesum døgum. Ikki akkrát tí Føroyar koma á vitjan, men heldur av kroystu støðuni, sum landslið teirra er í í løtuni. Tað man nevnliga vera sjáldan – um nakran tíð - at skotska landsliðið hevur eina somikið veika grundstammu, sum teir hava í løtuni. Einastu leikararnir, sum kunnu rópast fyri stjrønur, eru helst Paul Lambert og Barry Ferguson, men heldur ikki teir eru heilt á ovastu tindunum í løtuni.

Tá er munur á, hvussu liðið sá út í '70- og 80'unum. Kenny Dalglish, Billy Bremner, Gordon Strachan og Gary MacAllister fyri bert at nevna nakrar, vóru leikarar, sum høvdu sína dagligu gongd í avgjørda europeiska oddinum. Í dag er tað bert Paul Lambert, sum hevur slíkar royndir, men tað er nakað síðani, at hann við Dortmund var við til at vinna Europa Cup kappingina, og sum so er hann eisini ógvuliga ivasamur til dystin móti Føroyum.

Tí tykist í nógvar mátar, sum um virðingin fyri egnum mátti fullkomuliga er burtur. Tó at Føroyar í allar mátar áttu at verið ein pinkulingur í mun til Skotland, so verður frá flestu síðum gjørt nógv burturúr, at hetta er ein trupul dystur. »Vit hava orsøk at óttast« og »Føroyar eru ikki léttar« eru bert tvær av mongu yvirskriftunum, sum seinastu dagarnar hava prýtt ítróttarsíðurnar í skotskum bløðum, og sjálvur tykist Berti Vogts eisini at hava hálvgum garderað seg ímóti vónbrotinum, sum tað verður, um Skotland ikki vinnur. Í samrøðum við ymsar miðlar leggur hann dent á, hvussu væl skipað føroyska verjuspælið er, og at tað mest sum er ógjørligt at skora móti okkara, tá tíggju mans standa í verjupartinum.

Og spyrt tú skotan á gøtuni, so er mest sum eingin teirra, ið tykist rósa landsmonnum sínum. »Scotland is shit« og »Berti should go« tykjast vera standardsvørini, sum taxaførarar og tænarar hava til fótbóltsspurningarnar, sum verða settir. Og besta svarið í so máta mundi ein føroyskur áskoðari helst fáa, tá hann eitt sindur erpin vildi gera vart við, at føroyska liðið ætlaði sær okkurt.

»We're gonna beat Scotland« segði áskoðarin ramliga við ein tænara, tá hesin fregnaðist um, hvørji ørindi teirra vóru her niðri. Og so kom kontanta svarið.

»That shouldn't be to hard!«




Starvsfólkaleiðari við hugsjónum

Vit sóknast eftir nýggjum starvsfólkaleiðara, nú dugnaligi starvfólkaleiðari okkara hevur tikið við nýggjum avbjóðingum.

Nýggi starvsfólkaleiðarin gerst partur av einari fyritøku við visiónum og málum á starvsfólkaøkinum. Bæði starvsfólk og leiðarar hava seinastu árini verið í einari víðfevndari menningartilgongd.

Virkni starvsfólkapolitikkurin hevur stóran týdning soleiðis, at Sparikassin framhaldandi varðveitir og dregur dugnalig starvsfólk til sín. Starvsfólkini skulu støðugt mennast, so Sparikassin eisini í framtíðini megnar at veita kundunum framúr góða fakliga og persónliga ráðgeving.

Trivnaður og arbeiðsgleði millum starvsfólkini hevur eisini avgerandi týdning fyri Sparikassan, og á hesum økjum skal starvsfólkaleiðarin vera virkin.

Fyri at røkka hesum málum krevst ein góður og sjálvstøðugur starvsfólkaleiðari við menniskjakunnleika og áhuga fyri starvsfólkaviðurskiftum, og sum dugir væl at fáast við fólk. Innlit í Human Ressource Management – gagnnýtslu av starvsfólkaførleikum – er gott grundstøði.

Evnini at samstarva, samskifta og lurta mugu vera góð. Vit ynskja okkum eina eldsál, ið eggjar øðrum til og torir at ganga á odda. Stundum krevst eisini av starvsfólkaleiðaranum, at hann loysir ósemjur, og til tess krevst dirvi, innlit og oftani eisini humor.

Starvsfólkaleiðarin er sparringspartnari hjá stjórnini, deildarleiðarum og starvsfólkum í Føroya Sparikassa, og hann vísir beinleiðis til stjórnina.

Nakrar fyrisitingarligar uppgávur liggja eisini hjá starvsfólkaleiðaranum, m.a. setan og útbúgving av starvsfólkum, lønarútgjalding og frítíðaruppgerðir. Á Starvsfólkadeildini starvast trý fólk, leiðarin íroknaður.

Starvið verður lønt sambært avtalu.

Áhugað eru vælkomin at venda sær til Bjarna Olsen, stjóra, á telefon 348575 ella á teldupostí bjarni.olsen@sparikassin.fo.

Umsóknir skulu vera Sparikassanum í hendi í seinasta lagi týsdagin tann 16. september 2003. Tær skulu stílast til:

FØROYA SPARIKASSI
Att.: Bjarni Olsen, stjóri
Yviri við Strond 2
FO-100 Tórshavn

FØROYA SPARIKASSI
www.sparikassin.fo